Álit

í

løgtingsmáli nr. 67/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m. (67 ára pensjónsaldurin hjá landsstýrisfólki eftir gomlu skipanini fylgir fólkapensjónsaldri)

Løgmaður, Aksel V. Johannesen, hevur lagt málið fram 11. desember 2025, og eftir 1. viðgerð 15. desember 2025 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 6. januar og 5. og 9. februar 2026.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við løgmann, Aksel V. Johannesen.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið snýr seg um at seta eitt soljóðandi nýtt pkt. inn í § 13, stk. 2 í lógini: "*Tó verður 67 ára pensjónsaldurin hjá landsstýrismonnum broyttur til vanliga fólkapensjónsaldurin í løgtingslóg um almannapensjónir*."

Orsøkin er, at í 2014 varð lógin um samsýning og eftirløn landstýrismanna broytt soleiðis, at man fór frá tænastumannaeftirløn til, at landstýrisfólk frameftir fáa 15% í eftirlønargjaldi. Hetta merkti eisini, at pensjónsaldurin frameftir var tann til eina og hvørja tíð galdandi pensjónsaldur.

Í 2018 samtykti Løgtingið, at pensjónsaldurin skuldi verða 67,5 ár í 2025 og 68 ár í 2031. Hesum ásetingum fylgja tey landstýrisfólk, ið koma undir ta lógina.

Løgtingið hevur síðan samtykt, at frá komandi løgtingsvali at rokna fylgir pensjónsaldurin eftir nýggju skipanini hjá løgtingsfólki tí vanliga pensjónsaldrinum, ið er galdandi til eina og hvørja tíð.

Lógin, ið var galdandi áðrenn omanfyrinevndu broytingar frá 2014, ásetti, at pensjónsaldurin fyri landsstýrisfólk er 67 ár, og sostatt eru enn nøkur landstýrisfólk, ið hava 67 ára pensjónsaldur. Tað er hesa áseting, ið ætlanin er at broyta við hesum lógaruppskoti.

Viðvíkjandi spurninginum um at lóggeva við afturvirkandi kraft, so vil nevndin vísa á, at Løgtingið hevur í 2018 samtykt at broyta pensjónsaldurin fyri øll, og við teirri broyting broyttust væntaðu pensjónsviðurskiftini hjá nógvum fólki. Nevndin heldur ikki, at fyrrverandi landsstýrisfólk, sjálvt um tey eru tænastumenn, eiga at hava øðrvísi rættindi enn onnur á arbeiðsmarknaðinum, og tí tekur nevndin undir við hesi lógarbroyting.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 19. februar 2026

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Dennis Holm	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	